# Kendur motorsúkklumaður fyllir 50 ár

Í dag, mikudagin 19. september, fyllir Ove Ritter, seniorsersjantur og Harley Davidson umboðsmaður í Havn, 50 ár.

Ove er dani, sum hevur búð í Føroyum síðan 1982 og er kanska mest kendur fyri sín áhuga fyri motorsúkklum, serliga Harley Davidson, sum hann í dag selur og leigar út.

Upprunaliga er Ove útbúgvin amboðssmiður. Nakað eftir at hann varð útlærdur, bleiv hann innkallaður til hertænastu. Sína sersjantútbúgving hevur hann fingið innan danska herin. Hann var á Cypros í ST-tænastu, áðrenn hann kom til Føroyar í 1982 og bleiv settur sum leiðari av „Bevogtningstjenesten“ á Flyvestation Tórshavn, har hann eisini kom at standa fyri eftirútbúgving av starvsfólkum á støðini.

Fyrst í 90-unum arbeiddi hann í trý ár á Flyvestation Værløse. Í hesum tiðarskeiði var hann eisini í Kuwait í ST-ørindum. Í 1995 byrjaði hann aftur í Mjørkadali. Tó var



hann, í 1997, eitt ár á „Eskadrille 500“ í Vedbæk, og í 2002 var hann við í altjóða friðardeildini í Kirgisistan.

Ove hevur altíð havt stóran áhuga fyri motorsúkklum. Sínar fyrstu 10.000 kilometrar ar á eini Harley Davidson koyrdi hann, tá hann var í Kuweit í ST-ørindum. Tá hann kom aftur til Danmarkar, keypti hann sær eina Harley í 1996, sum hann síðan tók við til Føroyar, har hon varð skrásett sum nr. HD001, sum tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum.

Eftir at hava keypt og selt fleiri Harley Davidson, læt Ove upp sín egna Harley handil fyri skjótt fimm árum síðan. Í dag eru umleið 70 Harley motorsúkklur í Føroyum.

Ove hevur eisini skipað fyri fleiri motorsúkklutúrum bæði í Føroyum og í grannalondum okkara. Hann dugir væl at skipa fyri og at leggja til rættis. Um tað eru motorsúkklu-klubbar sum koma higar at vitja, ella hann skipar fyri túrun uttanlands. Í hesum mánaðinum skipar hann t.d. fyri einum túri til Vestmanna, og næsta ár til Kuba, Danmark og Ísland. Í 2009 hevur hann ætlanir um at skipa fyri einum túri tvørtur um alt USA.

Ove er giftur Annu, f. Holm Hansen, í Havn. Tey eiga synirnar Petur, 21 ár, og Hans Kristian, 16 ár.

Føðingardagin er Ove staddur í Íslandi saman við familjuni, har hann sjálvandi eisini leggur MC-túrin til Íslands næsta ár til rættis.

Vit ynskja Ova hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

**mg**

# †

## Andlát og jarðarferðir

**Tove Petersen á Argjum**, andaðist sunnudagin, 77 ára gomul. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni mikukvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Tove, kunna lata lata Sambýlinum á Mýrini í Hoyvík eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Louisa Olsen á Ryggi í Miðvági** andaðist týsdagin í Åbybro, 91 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Ata (Æda) á Reynatúgvu, á Sandi** andaðist í heiminum týsdagin, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Dagurin**
**20. september. Tobias.** Til minnis um tann Tobias, sum apokrýfiska bókin Tobits bók veit at siga frá. Navnið er hebráiskt og merkir Guð er góður.

# Christian Høgnesen 85 ár

Fríggjadagin 21. september verður Christian Høgnesen í Klaksvík 85 ár. Christian er ættaður úr Niðristovu á Norðoyri, sonur bóndahjúnini Kristionnu og Jóan Karl. Hann vaks upp í einum stórum barnaflokki. Tey vóru 9 systkin, harav tann eina systirin doyði av meslingum í 1916, bert 2 mánaðir gomul. Teir vóru 4 brøður: Sámal, ið var bóndi á Oyri, Christian, Dia og Karl, ið búsettust í Klaksvík. Systrarnar vóru Karin, ið flutti til Havnar síðst í sekstiárunum, Lena, ið búði á Oyri, Frida og Elisabeth, ið búgva í Klaksvík. Eftir av systkinaflokkinum eru Christian, Frida og Elisabeth.

Christian vaks upp í eini tíð, har tað var av stórum týdningi, at tú sjálvur kundi framleiða meginpartin av tí, tær tørvaði til lívsins uppihald, og lærdi hann bæði at fáast við landbrúk, handverk og fiskiskap. Í sínum bestu árum hevði Christian útróðrarbátarnar



Sævarenni og Brattenni saman við bróðrinum Dia og sváginum Jóan Paula. Seinni legðist Christian upp á land og fór at fáast við hondverk burturav.

Christian giftist í 1954 við Jóhonnu Frederikku Joensen frá Gjógv og búsettust tey á núverandi Kráargøtu í Klaksvík. Jóhanna og Christian fingu tvær døtur, Kristinbjørg, ið býr í Hoyvík og Jórun, ið býr í Klaksvík, og tær eiga 4 børn. Jóhanna og Christian vóru bæði væl kjølfest í føroyska samfelagnum og í føroyskari mentan, vóru nærløgd, arbeiðssom og blíð at koma á tal við og á gátt hjá. Tey vóru ættarkær, góð við síni og áhugaði í at kenna sínar røtur og gingu bæði til ættargransking. Jóhanna doyði í 2004, og var tað stórur smeitur fyri Christian at missa hana. Men Christian er sannur lívskunstnari og fall ikki fátt.

Hóast sín høga aldur, sæst Christian enn á Stongunum og í egningarskúrinum, har honum dámar væl at koma, hann fylgir væl við, hvussu gongst bátunum á Vágni og føroyska fiskiflotanum sum heild, og enn flotar hann bát av Borðoyarvík, tá ið líkindi eru. Tá ið líkindini ikki eru so góð til uttandura arbeiði, hugnar Christian sær innandura við handverki og lesnaði. Christian er góður heimildarmaður, og fleiri eru tey, ið hava gjørt brúk av hansara vitan og skili, og greiðir hann fegin frá hendingum og lívsroyndum úr sínum langa lívi. Christian hevur upplivað stórar broytingar í okkara samfelagi. Samstundis sum hann er partur av tí gomlu mentanini, so hevur hann eisini tikið við nøkrum av tí, sum nýggja tíðin hevur at bjóða. Hetta sæst m.a. við, at hann brúkar føroyska húgvu, koyrir á knallert og hevur fartelefon í lummanum.

Christiani dámar væl at vera saman við fólki og hevði verið glaður at sæð skyldfólk, vinir og kenningar á hesum stóra degi. Honum verður ynskt hjartaliga tillukku við teimum 85.

Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini Jórun og versoninum Mikkjali á Garðsenda 23 í Klaksvík leygardagin 22.september frá klokkan 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**K.**

Lesið Sosialin -so eru tit við!